

## Minna útlendsk skip á reinføri á sjónum

Umhvørvisstovan hevur gjørt ein faldara, sum skal kunna útlendsk skip um, at havið skal ikki brúkast sum køstur. Burtursæð frá teimum føroysku skipunum eru nógv útlendsk skip við Føroyar, og tí hevur Umhvørvisstovan hildið tað vera neyðugt eisini er at minna hesi skipini á, at burturkast, olja o.a. ikki skal koyrast á sjógv, og at havið ikki skal nýtast sum køstur. Tí hevur Umhvørvisstovan nú gjørt ein faldara um hetta á enskum og russiskum. Í faldaranum er stutt kunning um tað skaðiliga við, at burturkast, olja og annað verður koyrt í havið. Eisini er yvirlit yvir galdandi lóggávu á økinum, viðkomandi telefonnummur, teldupostbústaðir og annað við í faldaranum. Faldarin er nýliga sendur til umboð fyri útlendsk skip, sum koma til Føroya, umframt havnarskrivstovur og onnur. Hetta er annar faldarin um burturkast frá skipum. Tann nfyrri, sum eitur "Koyr ikki á Vestfallið" kom í 2006. Eisini varð sjónvarpslýsing gjørd við sama heiti. Lýsingin verður enn av og á send í kvf undir táttinum Gevið gætur. Faldarin, bæði tann á føroyskum og hesir á enskum og russiskum eru gjørdir við stuðli frá Innlendismálaráðnum av játtanini til umhvørvisverndartiltøk.

# Danskur nevndarlimur tryggjar

**Tá Johannes Jensen og trý onnur leiðandi starvsfólk á Hotel Føroyum fyri trimum árum síðani saman við Tryggingarfelagnum Føroyar og Atlantic Airways stovnaðu eitt nýtt felag, sum skuldi reka hotellið, var brúk fyri einum tungvektara. Tað metti Johannes Jensen í hvussu so er, og tí bað hann Allan L. Agerholm, fyrrverandi hotelstjóra Hilton og núverandi á Crowne Placa, taka sætið í nevndini sína vegna**

**HOTEL FØROYAR**
*Leif Láadal*

Allan L. Agerholm hevur nógv um oyrini fyri tíðina, so tað var gott at flogfarið bara var hálvan annan tíma seinkað hendan dagin.

Hann er í Føroyum sum nevndarlimur í sambandi við aðalfundin hjá Hotel Føroyar samtakinum. Heimstaður hansara er Keypmannahavn, og tað hevur hann verið seinastu árini, tó at hann eisini hevur arbeitt á ovastu hotel-rók í London og aðrastaðni.

Í Keypmannahavn er hann stjóri fyri risastóru Copenhagen Towers verkætlanini. Tað vil siga, hann skal taka sær av hjartanum í fyritøkuni, Hotel Crowne Placa, umframt at hann skal hava leiðsluna fyri øllum tí tænastuvirksemi, sum fylgir við teimum túsundtals fermetrunum av skrivstovuhølum, ið skulu leigast út til feløg og virkir, tá skjøtul verður settur á í november í ár. So har er nokk at gera. Men nakrar túrar til Føroya skal hann árliga, og tað eru túrar, sum hann altíð gleðir seg til.

### Ikki nakar nevndargreðingur

Tá virksemið á Hotel Føroyum varð umskipað fyri trimum árum síðani, skuldu eigararnir seta saman nýggja nevnd. Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum samtakinum, valdi at seta ein uttanfyristandandi í nevndina sína vegna, og valið fall á Allan L. Agerholm, sum tá var stjóri á Hotel Hilton við Kastrup flogvøllin í Keypmannahavn.

- Eg kendi ikki Johannes frammanundan, men tá hann ringdi og spurdi, um eg kundi taka sæti, og vit síðani høvdu fundast eitt sindur, dugdi eg at síggja, at her var talan um eina sera spennandi uppgávu, fortelur Allan L. Agerholm, sum kortini ikki situr í nógvum nevndum.

- Eg eri bara limur í nøkrum fáum nevndum, tí eg havi eitt spennandi fulltíðarstarv at taka mær av dagliga, og harafturat vil eg gjarna vera til staðar, har eg eri nevndarlimur, fortelur danski nevndarlimurin í Hotel Føroyum.

Leikluturin hjá Allan L. Agerholm í nevndini hjá



Hotel Føroyum er fyri so vítt greiður. Hann er, um mann so kann siga, altjóða parturin. Maðurin, sum við einum beini í Keypmannahavn og einum úti í stóru verð, kann tryggja, at Hotel Føroyar eisini hevur fingurin á alheims pulsinum.

Men nevndarsessurin gevur eisini Allan L. Agerholm nakað.

- Føroyar eru tað, sum vit á marknaðarmáli rópa ein imperfektur hotelmarknaður í mun til ein perfektan. Tað vil siga, at tað ikki er optimal kapping á økinum. Her eru ikki so nógvir útbjóðarar, sum í øðrum londum og býum, men avbjóðingarnar eru kortini nógvar og stórar, og tí sleppi eg her at arbeiða eitt sindur øðrvísi enn eg geri í Danmark, og tað er sunt, sigur Allan L. Agerholm og skoytir uppí:

- Í Føroyum er diamentralur munur á háárstíð og lágárstíð, tá tað snýr seg um at selja seingjarpláss, og tí verða vit í Hotel Føroyum samtakinum noydd at hava fleiri bein at standa á, og har er Johannes Jensen

»Hvørki gullkranar ella B&O sjónvørp kunnu koma ístaðin fyri góð starvsfólk«.
*Allan L. Agerholm, hotelstjóri*

fantastiskur. Hann hevur eina ørgrynnu av hugskotum til, hvussu vit fáa lagt annað virksemið afturat vanliga hotel-rakstrinum.

### Halda honum aftur

Tað er í veruleikanum soleiðis, at nevndin í summum førum má halda aftur, tí dynamiski hotelstjórin hevur so nógv hugskot, at nevndin ikki heldur tað vera ráðiligt at seta alt í gongd, sigur Allan L. Agerholm.

- Tað er mín uppgáva saman við hinum nevndarlimunum at meta um hugskotini, og síðani geva grønt ella reytt ljós. Tey flestu hugskotini eru góð, og tá ein tíð er farin, vísa tey eisini sínar dygdir og týdning fyri virksemið. Men tað er komið fyri, at vit hava biðið stjóran bíða, og tað haldi eg at Johannes hevur forstáilsi fyri, tí um hann ikki hevði viljað havt eitt sindur av mótspæli, hevði hann nokk ikki biðið meg sitið í nevndini sína vegna, sigur Allan L. Agerholm.

## Stjørnuhotell

Her um okkara leiðir, er tað felagsskapurin Horesta, sum tryggjar, at tær stjørnur, sum hotel hava, svara til tey krøv, sum verða sett til hvørja stjørnu. Hotel Føroyar er eitt 4-stjørna hotel, men hevur 5 stjørnur, tá tað ræður um ráðstevnu-hotel.

Allan L. Agerholm sigur, at standardiseringin við hotel-stjørnum tíverri ikki er heimsumfatandi enn. Tískil uppliva vit, at stjørnurnar í Norðurlondum eru "bíligari", so at skilja, at eitt 5-stjørnað hotel í Keypmannahavn, ivaleyst ikki hevði kunna fingið 5 stjørnur í París ella New York. Tað gongur tó rætta vegin, tí hotelleiðslur og eigarar vilja ikki hava trupulleikar av ónøgdum útlendskum gestum, og tí síggja vit eitt rák, har góð norðurlendsk hotel heldur vilja hava eina stjørnu færri, og so verða á tryggari grundarlagi. Til dømis verður Crown Placa (sum letur upp í Cph í nov), har Allan L. Agerholm er stjóri, 4 stjørnur, sjálvt um tað eftir danskari meting, hevði kunnað havt fimm.